
LÓGARÁTAK
MÓTI
RÚSDREKKA-
OG
RÚSEVNIS-
KOYRING







## FERÐSLULÓGIN

- **Reglurnar um rúsdrekkakoyring verða herdar 1. oktober.**
- **Lægri mark fyri rúsdrekkakoyring.**
- **Harðari revsing og strangari reglur um frádøming av koyrikortinum.**
- **Nýggir prógvførslumøguleikar í rúsdrekkamálum.**

**Rúsdrekka og koyring hoyra ikki saman**
Tað hava vit leingi hoyrt, men 1. oktober koma nakrar lógarbroytingar í gildi, sum fara at merkja, at vit øll noyðast at taka hesi orðini í enn størri álvara. Fyrr í ár gjørdi Løgtingið fleiri broytingar í ferðslulógini, sum bera í sær, at reglurnar um rúsdrekkakoyring verða herdar.

Upprunin til broytingarnar, sum nú koma í gildi er í stóran mun Ferðslutrygdarætlanin fyri Føroyar frá 2007. Ein ætlan, sum hevur 0-hugsjónina sum stavnhald – t.v.s. málið um, at eingin skal doyggja ella fáa álvarsligt mein av ferðsluvanlukku.

**Vaksandi vandamál**
Hagtølini vísa, at talið á meldaðum óhappum á føroyskum vegunum er minkað tey seinastu árini, og somuleiðis talið á óhappum við perssónsskaða. Men tølini fyri rúsdrekka- og rúsevnakoyring vísa eitt óheppið rák tann skeiva vegin. Tað sama er galdandi fyri ferðsluóhapp, har rúsevnir og rúsdrekka hava verið uppi í.

Tað er hesi skeivu gongd okkara lóggávuvald nú roynir at steðga við at herða reglurnar um rúsdrekkakoyring og senda út eitt greitt signal um, at rúsur og koyring hoyra ikki saman.

**Rúsdrekkamarkið lækkar**
Ein av høvuðbroytingunum verður, at markið fyri hvat ið verður roknað sum rúsdrekkakoyring lækkar.

Fyrr vóru tvær ásetingar í ferðslulógini, sum raktu tann ávirkaða bilføraran. Promillumarkið upp á 0,5 og rúsdrekkamarkið upp á 0,8 promillu. Tað, sum lá millum 0,5 og 0,8 varð kallað promillumkoyring, og tað sum lá omanfyri 0.8 var rúsdrekkakoyring.

Nú verður bert eittans mark upp á 0,2 promillu. Alt, sum er omanfyri 0,2 promillu verður hereftir dømt sum rúsdrekkakoyring og samstundis fer hugtakið promillukoyring í søguna. Við hesum fáa Føroyar sama rúsdrekkamark, sum Svøríki hevur havt síðan 1990 og Norra síðan 2001.

Men hóast promillukoyringin nú hvørvur sum hugtak, so verður meginreglan um, at tess meira tú ert ávirkaður tess álvarsamari verða avleiðingarnar av lógarbrotinum, varðveitt. Spurningurin um frádøming av koyrikortinum og revsing fyri rúsaða koyring verður framhaldandi ásettur eftir hvussu høga promillu førarin hevði í blóðinum, tá ið hann varð tikin. Les meira um hetta niðanfyri.



**Null dope**
Men bilførarar verða eisini tiknir fyri at koyra ávirkaður av øðrum enn rúsdrekka. Eisini á hesum øki koma nýggjar reglur í gildi 1. oktober, so at tey, ið koyra ávirkað av rúsevnum verða meira javnsett við tey, sum hava drukkið.

Rúsevnir ávirka eisini koyriførleikan. Royndirnar vísa, at hendan koyring er eitt vaksandi vandamál, men sammett við rúsdrekkakoyringina kundi tað vera ógvuliga trupult at fáa fólk dømd fyri at hava koyrt ávirkaði av rúsevnum ella øðrum evnum, ið ávirka koyriførleikan.

Tá talan er um rúsdrekka er ein positiv blóðroynd nóg mikið til at fella ein bilførara í rættinum. Men við rúsevnum skuldi meira til. Tað skuldi harafturat kunna prógvast, at bilførarin var so mikið rúsaður, at hann ikki var førur fyri at koyra bil. Og tann próvbyrðan kann vera tung at lyfta.

Fyri at lætta um og javnseta rúsdrekkakoyring og rúsevniskoyring er nú ásett eitt 0-mark fyri at koyra ávirkaður av rúsevnum ella øðrum evnum, ið ávirka tilvitið. Nú er tað nóg mikið fyri at fáa ein rúsaðan førara dømdan, um politiið bara kann prógva at hann var ávirkaður. Signalið, sum lóggávuvaldið sendir út er púra greitt: rúsevni og koyring hoyra als ikki saman.

Herdu reglurnar við einum 0-marki fyri rúsevnir og tilvitsávirkandi evnir er longu galdandi í Danmark, Svøríki og Norra.

**Alkometrið nýtast sum prógv í rúsdrekkamálum**
Viðvíkjandi rúsdrekkakoyring so hevur ein positiv blóðroynd higartil verið fortreytin fyri at fáa fólk dømd. Mátingarnar, sum vera gjørdar á staðnum, har fólk blása í eitt alkometur, hevur løgreglan higartil bert havt heimild at gera, fyri at staðfesta um grundarlag er fyri at taka eina blóðroynd.

Nú fær løgreglan víðkaðar heimildir, at nýta eitt góðkent alkometur – eitt sonevnt próvalkometur. Talan er um eitt tól, sum við stórum neyvleika mátar alkoholnøgdina í kroppinum, og støddirnar fyri alkoholstyrkini í útandingarluftini verða nú settar inn í sjálva lógina. Til hetta endamál er mátieindin ikki promilla, men millugram av alkoholi pr. litur av luft.

Nýggi kanningarhátturin hevur tann fyrimun, at hann verður mettur sum eitt nógv minni inntriv í persónliga frælsið enn ein blóðroynd. Ein annar fyrimunur er, at tað slepst undan at bíða eftir úrslitinum av blóðroyndini.

**Taka sveitta- og spýttroyndir**
Harumframt fær løgreglan nú størri kanningarheimildir á gerningsstaðnum. Møguleiki verður at taka sveitta- ella spýttroynd av føraranum ella at kanna eyguni á honum fyri skjótt at kunna staðfesta, um grund er at misteinkja hann fyri at vera ávirkaður. Higartil hava slíkar kanningar bert kunna verið gjørdar, um løgreglan hevði ein grundaðan illgruna til føraran.

Verður mett at førarin er ávirkaður av rúsevnum kann hann verða tikin við á støðina, har blóðroynd verður tikin. Sammett við rúsdrekkakoyring verður ein blóðroynd framvegis einasta fullgóða prógvið í málum um rúsevniskoyring.

**Koyrikortið situr leysari**
Koyrikortið fer at sita leysari í lummanum hjá teimum, sum ikki duga at halda akfør og rús hvør sær eftir 1. oktober. Reglurnar um frádøming av koyrikortinum verða nevnliga herdar.

Nú rúsdrekkamarkið lækkar niður í 0,2 promillu og hugtakið promillukoyring fer í søguna, lækka eisini mørkini fyri frádøming av koyrikortinum.

Markið fyri treytaðari frádøming av koyrikortinum, hevur verið 0,5. Tað verður nú 0,2. Tey sum hava havt koyrikortið styttri enn 3 ár, fáa eitt koyriforboð í staðin.

Og markið fyri treytaleystari frádøming av koyrikortinum, sum hevur verið 0,8 lækkar niður í 0,5. Í báðum førum er talan um at bilførarin missir koyrikortið fyrstu ferð. Er talan um endurtøku, eru aðrar og strangari reglur galdandi.

Men tað verður ikki bara lættari at missa koyrikortið. Eisini verður frádømingartíðin í teimum grovastu førunum longd. Ein bilførari, sum hevur havt meira enn 2,0 promillu í blóðinum, missir eftir galdandi lóg koyrikortið í 2 ár og 6 mánaðir, um tað er fyrstu ferð, hann verður tikin. Eftir 1. oktober er reglan tann, at førarin missir koyrikortið í samfull 3 ár, um promillan fer upp um 1,2.

Somuleiðis verður reglan strikað, sum sigur, at rúsdrekkamisnýtarar skulu fáa koyrikortið skjótari aftur enn onnur, um teir fara í viðgerð fyri rúsdrekkamisnýtslu. Ein slíkur fyrimunur verður mett-



ur at vera ósambærligur við sjónarmiðið um, at fólk grundleggjandi skulu viðgerast líka.

**Harðari revsing**
Umframt harðari reglur um frádøming av koyrikortinum verður revsingin fyri at koyra ávirkaður eisini harðari í framtíðini.

Revsingin fyri at koyra ávirkaður av rúsevnum ella øðum evnum, ið ávirka koyriførleikan, fer nú at líkjast revsingini, ið er galdandi fyri rúsdrekkakoyring. Eisini verður revsingin eins, tá ið talan er um endurtøkur í rúsevnis- og rúsdrekkamálum, tað vil siga í málum, har lógin verður brotin fleiri ferðir.

Undir herðandi umstøðum kann ein rúsaður bilførari verða settur í fongsul í hálvannað ár. Higartil hevur markið verið eitt ár.

Er talan um fyrsta lógarbrotið verður sum útgangsstøði dømd treytað frælsisrevsing við korum um samfelagstænastu ella korum um viðgerð fyri rúsdrekkamisnýtslu. Harumframt verður givin sekt.

Umframt alkoholpromilluna fara inntøkuviðurskiftini hjá førarunum nú at ávirka sektarupphæddirnar í málum um rúsdrekkakoyring.

**Fleiri á rúsdrekkaskeið**
Eftir 1. oktober verður kravið víðkað um at bilførarar, ið koyra ávirkaðir, skulu á rúsdrekkaskeið.

Í framtíðini skulu eisini tey, sum missa koyrikortið treytað vegna rúsdrekkakoyring – t.v.s. tey, sum hava minst 0,2 promillu í blóðinum – á skeið um rúsdrekka og ferðslu, eitt sonevnt R/F-skeið. Í dag er hetta bert eitt krav fyri tey, sum hava mist koyrikortið treytaleyst.

Endamálið við hesi lógarherðing er at skerpa tilvitanina um, at rúsdrekka og ferðsla hoyra ikki saman.

